## UTTAN ÚR HEIMI

## Væntar kríggj við Russland

Forsetin í Georgia, Mikhail Saakasjvili, sigur í samrøðu við franska blaðið Liberation, at tað georgiska fólkið eigur at fyrireika seg til, at kríggj kann bresta á ímillum Georgia og Russland.

Stríðið ímillum tey bæði londini snýr seg um landspartin Suðurossetia, sum er ein partur av Georgia, men sum krevur sjálvsstýri. Saakasjvili sigur, at Russland hevur sent hermenn til landspartin at hjálpa uppreistrarmonnunum har, og at russiskir hermenn hava verið í bardøgum við georgiskar hermenn.

Í síðstu viku kravdi georgiska tjóðartingið, at Russland skal taka sínar hermenn úr Suðurossetia alt fyri eitt. Saakasjvili heldur, at altjóða samfelagið eigur at skipa fyri einari ráðstevnu, sum skal avgera framtíðina hjá landspartinum. Tí vit nærkast einum kríggi, sigur hann við Liberation.

## Verja oljupallar ímóti yvirgangi

Myndugleikarnir í meksiko bera ótta fyri, at yvirgangsmenn fara at søkja at landsins oljupallum, og tí hevur stjórnin sett tvey herskip afturat at ansa eftir, at óviðkomandi før ikki sleppa ov nær pallunum.

Umleið 80 prosent av meksikonsku oljuni kemur frá pallum í Campeche-víkini við Meksikanska Flógvan, og eftirlitið har er hert munandi síðani atsóknirnar at USA fyri skjótt trimum árum síðani. Fleiri herskip sigla í økinum, og harafturat eru jagaraflogfør og tyrlur javnan á flogi uppi yvir pallunum. Herfyri keypti Meksiko tvey smá herskip úr Ísrael, og tey eru nú send út í Campeche-víkina at hava eftirlit við ferðsluni har.

Ein stórur partur av meksikonsku oljuni fer til amerikanska marknaðin, og tí bera myndugleikarnir ótta fyri, at yvirgangsmenn fara at royna at steðga útflutninginum til USA.

## Rok í Sao Paulo

Fólk í brasilska stórbýnum Sao Paulo eru í øðini, eftir at vápnað harkalið hava beint fyri seks heimleysum fólkum teir seinastu dagarnar.

Sambært BBC hava myndugleikarnir illgruna um, at drápsmenninir hava samband við onkran rúsevnafelagsskap. Fimm av fólkunum vórðu skotin seinasta hósdag og tað sætta, ein ung kvinna, varð skotin sunnukvøldið. Minst átta fólk eru særd.

Sunnudagin gingu fleiri túsund fólk mótmælisgongu ímóti harðskapinum. Borgarstjórin í Sao Paulo, Marta Suplicy, var ímillum mótmælisfólkini, og har heitti hon á fólkið um at hjálpa teimum heimleysu býarbúgvunum. Sambært BBC sova fleiri hundrað fólk, teirra millum kvinnur og børn, á gøtunum í Sao Paulu hvørja nátt. Skilið er tað sama í Rio de Janeiro. Har vórðu fleiri heimleys myrd í einum álopi í 1993. Seks menn vórðu tiknir, og tríggir teirra vórðu dømdir fyri morð.

## Funnu gomul hermannalík

Eitt italskt bjargingarlið hevur funnið líkini av trimum hermonnum hjá eysturríkska-ungarska herinum, sum fullu í bardaga í teimum italsku Alpunum í 1918. Hetta var út ímóti endanum á fyrra heimsbardaga.

Maurizio Vincenzi, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at leita eftir hermonnunum, sigur, at menninir fullu eftir øllum at døma í einum samanbresti við italskar hermenn tann 3. september í 1918. Samanbresturin var í næstan 4.000 metra hædd nærhendis sveisiska markinum. Eysturríkararnir vunnu bardagan við italiumenninar hendan dagin, men teir mistu ellivu menn, og hesir tríggir vóru teirra millum, sigur Maurizio Vincenzi við AP.

Tey trý líkini hava ligið í ísinum í Alpunum øll tey 86 árini, og sambært italsku bjargingarmonnunum hevur tað gjørt, at tey eru lítið farin. Kortini bleiv ikki roynt at kanna, hvørjir menninir vóru, og líkini vórðu tí jarðað í einum kirkjugarði í bygdini Peio í gjár.

# Hon verður einaferð forseti í USA

**– Tíðin er búgvin til, at USA fær eina kvinnu til forseta, og eg vóni, at tað verður Hillary Clinton, sigur fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin, Madeleine Albright**



*Hillary Clinton kann gerast tann fyrsta kvinnan í amerikanska forsetaembætinum, heldur Madeleine Albright*

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tann dagur kemur, tá USA fyri fyrstu ferð fær eina kvinnu í forsetaembætið. Vit hava sæð tað í øðrum londum, og aðrastaðni hava kvinnur verið forsætisráðharrar. Men eg veit, at tað er ikki lætt.

Madeleine Albright var uttanríkisráðharri hjá Bill Clinton í fýra ár, og tað embætið gjørdist krúnan á hennara langa politiska lívið. Hon dylir ikki fyri, at hon heldur nógv av Hillary Clinton.

– Eg haldi, at Hillary Clinton er ein av teimum mest sermerktu politikarunum í dag, og eg vóni, at hon ein dag verður amerikanskur forseti, sigur Albright við norska blaðið Aftenposten.

Sjálv veit hon ikki, at tað fer at lukkast Hillary Clinton at gerast forseti. Albright hevur kortini góðar vónir. Hon vísir á, at fyrrverandi forsetakonan eru ung enn, og at hon er í ferð við at fáa sær politiskar royndir. Hon situr í Senatinum, og eftir stuttari tíð hevur hon strítt seg upp á tær ovastu røkurnar í demokratiska flokkinum, og hon er ein kvinna, sum nógvir amerikanarar hava virðing fyri, sigur Madeleine Albright.

Hon hevur valt at halda seg uttan fyri valstríðið í ár, men heldur, at John Kerry hevur góðar møguleikar at basa Bush, forseta.

– Hann hevur góðar møguleikar, tí nógvir amerikanarar vilja hava eina broyting nú, sigur hon.

# Al-Sadr fær størri undirtøku

**Tann kringsetti irakski presturin Moqtada al-Sadr fær størri og størri undirtøku. Samstundis harðna atgerðirnar ímóti irakska stýrinum**



*Túsundtals shiamuslimar gingu í gjár kravgongu í irakska býnum Basra. Teir kravdu, at amerikanararnir skulu taka seg úr heilaga býnum Najaf*

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast hann er kringsettur saman við monnum sínum í býnum Najaf, sýtir presturin Moqtada al-Sadr fyri at gevast við mótstøðuni ímóti stýrinum í Bagdad og hersetingarvaldinum. Samstundis fær hann alt størri og størri undirtøku aðrastaðni í landinum.

Í gjár vóru stórar shiamuslimskar mótmælisgongur í býnum Basra har suðuri í Irak. Reuter skrivar, at nógvir av mótmælismonnunum vóru vápnaðir, og teir kravdu, at USA skal taka sínar hermenn úr Najaf. Nógvastaðni stongdu mótmælismenninir fleiri gøtur við brennandi bildekkum, og irakska tjóðarhirðin aftraði seg við at leggja uppí.

Nógv tann størsti parturin av fólkinum í Basra eru shiamuslimar eins og Moqtada al-Sadr, og seinastu dagarnar hava samanbrestir verið javnan ímillum viðhaldsmenn hjá prestinum og bretskar hermenn, sum hava støð í býnum.

### Tvær morðroyndir

Samstundis harðna atgerðirnar ímóti irakska stýrinum.

Gjáramorgunin royndu menn at beina fyri tveimum ráðharrum. Fyrst brast ein bilbumba tætt við bilafylgið hjá Sami al-Mudhaffar, kenslumálaráðharra. Ráðharrin skal óskalaður frá álopinum, men tveir av vaktarmonnum hansara doyðu, og trý onnur fólk vórðu særd.

Lítla løtu seinni varð roynt at beina fyri umhvørvismálaráðharranum, Mishkat Moumin, tá ein bumba brast tætt við bilin, sum hon sat í. Sjálv fekk hon ongan skaða, men minst fýra av lívverjum hennara doyðu av spreingingini.

# Danmark má fyrireika seg til veðurlagsbroytingarnar

Tøkniráðið í Danmark hevur nú skrivað fleiri av teimum donsku kommununum bræv, har ráðið mælir kommununum til at hava veðurlagsbroytingarnar í huga, tá tær leggja framtíðarætlanir.

Herfyri boðaðu danskir granskarar frá, at vatnstøðan í havinum við Danmark fer at hækka umleið ein hálvan metur tey næstu hundrað árini. Tað fer at ávirka viðurskiftini í teimum kommununum, sum liggja úti við sjógvin, og tí vil tøkniráðið hava hesar kommunurnar at hava hetta í huga, tá tær leggja ætlanir um útbyggingar í framtíðini, skrivar Politiken.

Eitt nú fer broytingin at hava stóra ávirkan á viðurskiftini í nógvum donskum havnum.



# Fjallarenning

**Partur av summartiltaki, sum Sandavágs Ítróttarfelag skipaði fyri í Sandavági leygardagin, var fjallarenning, har runnið var úr Sandavági niðan á Húsafelli og omanaftur**



*Rennararnir høvdu ikki stundir at njóta frálíka útsýnið av Húsafelli*

*Mynd: Edvard Joensen*

RENNING
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Vinnarin rann teinin upp á 40 minuttir og 20 sekund. Húsafelli er 591 metrar høgt.

17 luttakarar fullførdu túrin. Ein gavst rættiliga skjótt eftir byrjan.

Hóast titltakið varð nevnt renning, vóru kortini fleiri, ið tóku túrin sum ein vanligan motiónstúr og brúktu heldur longri tíð enn vinnarin. Kappast varð um eina flogferð, so okkurt var hjá teimum fyrstu at renna eftir. Og tætt var í oddinum. 15 sekund millum nummar eitt og nummar tvey, og so 10 sekund niður til nummar trý.

Elsti luttakarin í tiltakinum var 68 ára gamal, og tann yngsti var 10 ár. Teir brúktu ávikavist ein tíma og 30 minuttir og ein tíma og tríggjar minuttir um túrin.

Vinnari av renningini gjørdist ungi kollfirðingurin Jóan Karl Joensen, sum í summar hevur roynst rættiliga væl í rennikappingunum, sum verið hava. Hann brúkti 40.20 min. um túrin. Allan Nielsen úr Sandavági hevði tíðina 40.35, og Edgar Caballero úr Paraguay hevði 40.45 min. um at koma niðan á Húsafelli og aftur.

## Kongur og drotning vitjaðu føroyingar

Altjóða oljumessan ONS byrjaði í Stavanger í gjár, og í tí sambandi lat føroyski básurin við millum annað Atlantic Airways upp. Norski kongurin og drotningin boðaðu frá, at tey komu á stutta vitjan. Tað var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, sum tók ímóti teimum norsku kongligu. Oljumessan er liðug fríggjadagin, og kvøldið fyri syngur Eivør Pálsdóttir fyri oljufólki.



*Poul Mohr og Haraldur kongu.jpg: Haraldur kongur til vinstru hevur áður hitt føroyingar*

## Læra nógv av føroyingum

Eitt grønlendskt ferðalag við politikarum, vinnulívsfólki og embætisfólki hevur júst verið í Føroyum og kunnað seg um landið. Stjórin í Grønlendska Arbeiðsgevarafelagnum var væl nøgdur við ferðina.

-– Vit kunnu læra nógv av føroyskum loysnum, sigur Ole Rud, stjóri í Grønlendska Arbeiðsgevarafelagnum, við heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

Tað er Vinnuhúsið, sum hevur lagt ferðina hjá grønlendingunum til rættis. Skipað varð fyri kjaki, fyrilestrum og virkisvitjanum.

## Kaupthing hevði hall

Roknskapurin hjá Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F er almannakunngjørdur, og hann vísir eitt hall á 298.000 krónur. Hetta skrivar heimasíðan hjá Føroya Sparikassa. Kaupthing sigur í tíðindaskrivi, at úrslitið er ikki nøktandi.

– Men nógv virksemi hevur verið í felagnum og alt bendir á, at seinna hálvár verður munandi betri, stendur at lesa.

Føroya Sparikassi eigur stóran part av Kaupthing í Føroyum. Føroyski bankin eigur 49 prosent av íslendska felagnum.

## Bátur við manni ikki at finna

Ein bátur við einum manni umborð var týsdagin ávegis til Nólsoyar av Strondum, men hesin kom ikki fram til tíðina. Tórshavn Radio sendi út boð um hetta, og bátar í økinum byrjaðu at leita, men onki varð funnið.

Seinni um dagin fann løgreglan bæði bát og mann í Tórshavnar havn. Bátur og maður vóru í góðum standi, men maðurin hevði siglt fullur. Hann verður nú ákærdur fyri brot á sjólógina.

## Olja á sjógv

Olja var farin á sjógv mánakvøldið klokkan 18:00 frá einum russara á fjørðinum uttanfyri Havnina. Oljan varð tikin upp beinanvegin. Ein bót verður skrivað antin til veitara ella móttakara, men alt eftir hvør hevur ábyrgdina av spillinum.

# Eingir embætismenn uppií

**Tíðindastjórin í TV2 heldur uppá, at eingir embætismenn hava verið orsøk til søguna um føroysku og donsku fiskimenninar, sum fekk Fiskimannafelagið at kæra støðina til Pressenævnet**

TV2
*Edvard Joensen*

Tíðindastjórin á TV2, Michael Hertz, ásannar, at tað var rættiliga illa umhugsað av TV2 at senda innslagið, sum varð orsøk til kæruna frá Føroya Fiskimannafelag. Men eingir embætismenn hava borið við til hetta bálið, sigur hann.

– Tað er greitt, at vit hava ikki gjørt okkara arbeiði nóg væl, sigur hann. Har eru so ógvuliga nógvir leysir endar í søguni, sum vit als ikki hava kannað. Og tað er bara ikki nóg gott arbeiði frá okkara síðu, ásannar hann.

Sæð í baksýni er lætt at siga, viðgongur hann, at skipaninar, vit tosa um, líkjast ikki. Har eru nógvar torgreiddar reglur, og fyri føroyska partin er bert talan um ein heilt lítlan part av fiskimonnunum.

Spurdur um tað er so, sum formaður Føroya Fiskimannafelags hevur hug at halda, at keldan til søguna eru fólk, sum vóru á ráðstevnu um blokkstuð-ulin, ið hildin varð á Christiansborg, sigur Michael Hertz, at eingin embætismaður hevur borið við til hetta bálið.

– Vit hildu okkum hava funnið eina góða søgu, sum vit valdu at senda. Aftan á hava vit í ólukkumát sannað, at søgan var ikki nóg væl útborin. Tað er ikki av ræðslu fyri Pressenævnet, at vit hava rættað hana. Men bert tí, at vit hava ásannað, at hon var ikki røtt, sigur hann.

Hann sigur, at tann parturin av málinum, har Kristian Thuelsen Dahl frá Dansk Folkeparti hevur tikið málið upp politiskt, hevur einki við innslagið hjá TV2 at gera.

Hann hevði undan hesum innslagnum sett fíggjarmálaráðharranum nakrar spurningar, og tí valdu vit at gera eina samrøðu við hann, sigur Michael Hertz, tíðindastjóri í TV2.

## Økt rúsdrekkakoyring í Norðurlondum

Norðurlendskur ársfundur um ferðslutrygd var um vikuskiftið í Reykjavík. Ymisk viðurskifti vórðu havd á lofti, millum annað rúsdrekkakoyring. Norðurlendska Ferðslutrygdarráðið óttast øktu rúsdrekkakoyringina í Norðurlondum.

- Ferðslutrygdin í Norðurlondum hevur verið í stórari framgongd seinastu árini, men tað at fólk koyra ávirkað ger, at framgongdin ikki er so stór, sum hon kundi verið. Tað er eyðsæð, at samband er í millum rúsdrekkakoyring og fallandi prísir á rúsdrekka, og at tað er lættari at fáa hendur á tí, stendur at lesa í yvirlýsing frá Norðurlendska Ferðslutrygdarráðnum.

Víst verður á, at rúsdrekkakoyringin er ikki bert ein spurningur um ferðslutrygd, men at tað eisini er ein samfelagsspurningur.

-Vanligu upplýsingarátøkini kunnu missa ávirkan, um aðrar kreftir í samfelagnum beinleiðis, ella óbeinleiðis eru við til at økja um misnýtsluna av rúsdrekka, sigur Norðurlendska Ferðslutrygdarráðið í yvirlýsingini.

## Ríkir norðmenn

Norðmenn leggja nógva orku í at tryggja vælferðina hjá komandi norskum ættarliðum. Eitt lið í hesi ætlan er tann ovurstóri oljugrunnurin, sum er nógv vaksin í øðrum ársfjórðingi. Ognin var 915 milliardir norskar krónur í fyrsta ársfjórðingi í ár, men í seinna var ognin vaksin til 943 milliardir norskar krónur. Tað eru hækkandi oljuprísirnir, sum eru orsøk til stóra vøksturin í norska oljugrunninum.